# Mín besta **uppskrift**

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos



**UPPSKRIFT:**
Andrea Reynstind

## Kleiggjut sjokulátakaka

| | |
|---|---|
| 3 dl | av sukri |
| 1,5 tsk | av vaniljusukri |
| 0,5 tsk | av salti |
| 4 spsk | av kakao |
| 1,5 dl | av hveitimjøli |
| 2 | egg |
| 100 g | av smøri ella margarini |

Blanda sukur, vaniljusukur, salt, kakao og hveitimjøl saman. Smelta smørið. Koyr eggini og smørið í. Smyr ein eldfastan form og koyr deiggið í. Hita ovnin til 160 hitastig og baka niðarliga í ovninum í umleið 35 minuttir.

Borðreið við róma og frískum fruktum.

**MÍN BESTA UPPSKRIFT**
er nýggjur teigur í Vikuskiftis Sosialinum, har lesarin kann senda okkum sína bestu uppskrift, saman við mynd av rættinum og navni á kokkinum.

Øll sløg av uppskriftum eru vælkomnar, bæði bakstur, matur og drekka, men tær skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Send tína bestu uppskrift til:
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**FO-110 Tórshavn**
**mrk. uppskrift**

Ella til post@sosialurin.fo.

Uppskriftin, sum verður prentað í blaðnum, fær *gávukort á kr. 300,-* frá **Thomas Dam búnýti**



Thomas Dam búnýti

TÓRSHAVN
Niels Finsensgøta 18
tel. 36 30 00

SALTANGARÁ
Heiðavegur 56
tel. 44 76 04



*Hártræðið vann "Fantasy-bólkin" á salongshowinum*

# Átta tímar at gera hártræið

**HÁRTRÆ**
**Inna Törnroos**
inna@sosialurin.fo

Eitt træð, sum er gjørt av hárið. Hvør hevði trúð, at tað bar til?

Tær á salong Vera Klipt sóu onga forðing í hesum, og gjørdu flottu vinnarafrisýruna á salongshowinum sunnudagin.

– Meiningin var, at vit skuldu gera eitt fuglabúr, men tá vit vóru komnar eitt sindur ávegis líktist búri mest einum træði, sigur Vera Larsen.

Modellin Ingibjørg hevur sera langt og tjúkt hár. Vera hevur nýtt hana einaferð fyrr til salongshow í 2007.

Tá avgerðin var tikin, at tað var eitt træð, sum skuldi gerast, fóru tær út at leita eftir leyvum at festa í hárið og greinar til armarnar hjá Ingibjørg.

– Vit byrjaðu klokkan 10 um morgunin og vóru lidnar um klokkan 18. greiðir Vera Larsen frá. Tær vóru allar við frá salongini og skiftust um at arbeiða við trænum.

Hárið varð viklað upp á jarntræðrir so, at tað skuldi síggja út sum greinar.

Ingibjørn varð øll sum hon var,



rulla inn í svarta foliu, og greinar stungnar inn, so at hon rættiliga sá út sum eitt træð.

Hon varð smurd við heystligum litum, brúnt, grønt og gylt.

Ein av dómarunum á salongshowinum, Karin Sólsker sigur, at tað var ein total "waw-effekt" tá træðið kom inn á pallin.

– Tað var so stórt og so ómetaliga flott, so har var eingin ivi í, at hetta var vinnarin, greiðir Karin frá.

Vera Larsen er glað um, at tær vunnu og staðfestir at hetta nokk ikki er ein frisýra man ger tvær ferðir.

Salong Evoke vann bólkarnar damur og harrar.